VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið.

Tórshavn, tann 6. januar 2015
Vmr J.Nr.: /15/00002

Viðgjørt: BjD

**Løgtingsmál nr. /2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 8 og § 9 verða broyttar soleiðis:

”**§ 8.** Við arbeiðsskaða í hesi lóg er at skilja vanlukka, smb. § 9, og vinnusjúka, smb. § 10, ið stendst av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir.

**§ 9.** Við eina vanlukku er sambært hesi lóg at skilja ein persónskaði, ið er elvdur av einum tilburði ella eini ávirkan, sum hendir brádliga ella innan fyri 5 dagar.
*Stk. 2.* Fyri vanlukkur er rættarvirknaðurin í hesi lóg galdandi frá degnum, tá vanlukkan hendi, ella frá degnum, tá ávirkanin, sum hevur elvt til vanlukkuna, heldur uppat, um ikki annað er ásett í lógini.”

2) § 13 verður stk. 2 og “smbr. tó stk. 2” í stk. 1 strikað.

3) Í § 15, stk. 1, og § 21, stk. 2, verður “vanlukkutilburðir, stutttíðar skaðilig árin og lyftiskaðar” broytt til ”vanlukkur” .

4) Í § 21, stk. 1, verður “vanlukkutilburður, stutttíðar skaðiligt árin ella lyftiskaði” broytt til “vanlukka”.

5) Í § 21, stk. 3, verður ” vanlukkutilburðurin, stutttíðar skaðiliga árinið ella lyftiskaðin” broytt til “vanlukkan”.

6) Í § 24, stk. 3, verður “ella brádliga hendir lyftiskaðar sbrt. § 9” strikað.

7) Í § 29, stk. 1, verður “vanlukkutilburð, sbr. § 8, nr. 1, ella stutttíðar skaðilig árin, sbr. § 8, nr. 2” broytt til ”vanlukku”.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 60 60 • TELEFAX 35 60 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

8) Í § 29, stk. 2, verður “umframt brádliga hendar lyftiskaðar, sbr. § 9,” strikað.

9) Í § 21 verður aftaná stk. 1 sett:
*“Stk. 2.* Arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi skal endurrinda útreiðslurnar hjá tryggingarfeløgunum í stk. 1, umframt rentu við 1% yvir diskonto Tjóðbankans, uttan so, at Vanlukkutryggingarráðið metir, at talan er um slíkar umberandi umstøður, at tann tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi eigur heilt ella partvíst at frítakast fyri at endurrinda.
*Stk. 3.* Upphæddin, sum endurrindast skal sambært stk. 2, verður ásett og innheintað av Vanlukkutryggingarráðnum og samsvarandi nærri reglum, ásettar av landsstýrismanninum, lutfalsliga býtt ímillum tryggingarfeløgini. Útpantingarrættur er fyri upphæddina, sum endurrindast skal, umframt rentur og aðrar útreiðslur hesum viðvíkjandi.
*Stk. 4.* Í tann mun, tað verður mett at vera rímiligt, kann Vanlukkutryggingarráðið geva arbeiðsgevaranum ella tí sjálvstøðugt vinnurekandi upphæddina eftir.”

Eftir hetta verður núverandi stk. 2, 3 og 4 til stk. 5, 6 og 7.

10) § 23, stk. 5, verða broytt soleiðis:
”*Stk. 5.* Er fráboðan ikki send inn rættstundis, kann tryggjaði ella tey eftirsitandi innan eitt ár, eftir at arbeiðsskaðin hendi, kortini seta fram krav um endurgjald eftir lógini. Fyri vinnusjúkur, sambært § 10, verður freistin roknað frá tí degi, tann tryggjaði ella avvarðandi hansara gjørdist varugur við, at sjúkan kann vera treytað av arbeiðinum. Síggjast kann burtur frá freistini, tá ið skjalprógv eru fyri, at tryggjaði hevur verið fyri einum arbeiðsskaða, samb. § 8, og tryggjaði ella tey eftirsitandi vegna arbeiðsskaðan hevur rætt til endurgjald v.m. sambært § 38. § 39, stk. 2, verður ikki nýtt, tá ið mett verður um atvoldarsamband eftir hesari áseting.”

11) Í § 24, stk. 1, verður aftaná ”fráboðanarskylduna” sett ”fyri vanlukkur”.

12) Í § 35 verður aftaná stk. 3 sett:
”*Stk. 4.* Áðrenn Ankestyrelsen viðger eina kæru eftir stk. 2, skal Vanlukkutryggingarráðið taka støðu til, um grundarlag er fyri at geva kæraranum heilt ella partvíst viðhald. Kæran skal tí sendast Vanlukkutryggingarráðnum.
*Stk. 5.* Kann Vanlukkutryggingarráðið ikki geva kæraranum viðhald, verður kæran send víðari til Ankestyrelsen við grundgevingini hjá Vanlukkutryggingarráðnum fyri avgerðini og endurmetingini.”

Eftir hetta verður núverandi stk. 4 til stk. 6.

13) § 44, stk. 3, verða broytt soleiðis:
*“Stk. 3.* Er eitt hjálparamboð sum nevnt í stk. 1 og 2 nýtt í sambandi við arbeiðið, og er hetta hjálparamboð vorðið skatt, orsakað av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir, rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 7, ella Vinnusjúkugrunnurin kostnaðin av at umvæla ella endurnýggja hjálparamboðið.”

14) “§ 79 a. Er vinnusjúka staðfest, og hevur arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi ikki goldið tað í § 79, stk. 1, nevnda gjald, verða útreiðslurnar nevndar í § 22, stk. 1, § 28, stk. 4 og § 37, stk. 3, umframt veitingarnar, sbrt. § 38, rindaðar av Vinnusjúkugrunninum.
*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi skal endurrinda útreiðslurnar hjá

Vinnusjúkugrunninum í stk. 1, umframt rentu við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað, uttan so, at Vanlukkutryggingarráðið metir, at talan er um slíkar umberandi umstøður, at tann tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi eigur heilt ella partvíst at frítakast fyri at endurrinda.
*Stk. 3.* Upphæddin, sum endurrindast skal sambært stk. 2, verður ásett av Vanlukkutryggingarráðnum og kann, við rentum og øðrum útreiðslum hesum viðvíkjandi, verða kravt inn av Vinnusjúkugrunninum sum írestandi skattur sambært § 78 og § 135 í skattalógini samsvarandi nærri reglum, ásettar í kunngerð av landsstýrismanninum.
*Stk. 4.* Í tann mun, tað verður mett at vera rímiligt, kann Vanlukkutryggingarráðið geva arbeiðsgevaranum ella tí sjálvstøðugt vinnurekandi upphæddina eftir."

15) Í § 79, stk. 4, 3. pkt., verður orðið "arbeiðstakarin" broytt til "arbeiðsgevarin.

Ásetingin er ein parallellur til § 21, stk. 1-4.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Lógin fær gildi fyri arbeiðsvanlukkur, ið henda á gildiskomudegnum ella aftaná gildiskomudagin og vinnusjúkur, ið verða fráboðaðar á gildiskomudegnum ella aftaná gildiskomudagin.

## iðmerkingar til lógaruppskotið

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

**Endamálið við lógini**

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Løgtingslógin um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógin) er frá 2009.

Arbeitt varð leingi við uppskoti um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, sum skuldi avloysa tágaldandi vanlukkutryggingarlóg frá 1966. Tann lógin var skipað á annan hátt, og við tað at lógin ikki varð mett at vera tíðarhóskandi, var tørvur á dagførdari arbeiðsskaðatryggingarlóg, sum bæði umfataði vanlukku og vinnusjúku.

Royndir av málsviðgerðini eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini hava víst á, at tørvur er á meiri dagføring millum annað í samsvari við arbeiðsskaðatryggingarlógina, ið er galdandi í Danmark.

**Hoyringar**

**Ummæli**

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligar avleiðingar

#### A. Fyri landið

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið og Vinnusjúkugrunnin, sum eftir uppskotinum skulu rinda teirra lutfalsliga part av málsviðgerð og rakstri av Vanlukkutryggingarráðnum, umframt at landið skal rinda veitingarnar eftir lógini, tá ið landið hevur valt ikki at lata ábyrgdarvandan sambært hesi lóg til eitt tryggingarfelag.

Kostnaðurin hjá Vinnusjúkugrunninum er útreiðsluneutralur, tí peningurin verður rindaður úr grunni, sum arbeiðsmarknaðurin rindar gjald til.

#### B. Fyri kommunurnar

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

#### C. Fyri vinnuna

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2. Umsitingarligar avleiðingar

Uppskotið hevur einans umsitingarligar avleiðingar fyri Vanlukkutryggingarráðið.

### 3. Umhvørvisavleiðingar

Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Sosialar avleiðingar**

Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:** Broytingin samsvarar við broytingina, ið varð gjørd í 2003 í tí donsku ”lov om arbejdsskadesikring” við lóg nr. 422 frá 10. juni 2003 (§ 5 og § 6 i lov om arbejdsskadesikring). Viðvíkjandi endamálinum verður sum heild tikið útgangsstøði í viðmerkingunum í tí danska lógaruppskotinum (”lovforslag 216 2002-2003).

Víst verður á, at tað yvirskipaða endamálið við arbeiðsskaða broytingini er at víðka og at gera skaðahugtøkini einfaldari, harundir vanlukkuhugtakið.

Ætlanin við arbeiðsskaða broytingini er tí at víðka arbeiðsskaðahugtøkini soleiðis, at allir skaðar, har tað er samanhangur millum ávirkan á arbeiðið og skaðan, kunnu góðkennast. Tað ber við sær millum annað, at tað ikki longur skal vera møguligt at avvísa vanlukkur við teirri grundgeving, at tann ávirkan, sum var orsøk til skaðan, kundi roknast við ella var vanlig í arbeiðinum hjá skadda, tá tað er ein medisinskur samanhangur millum ávirkanina og skaðan.

Á sama hátt skal tað ikki longur vera møguligt at avvísa mál um stuttar skaðiligar ávirkanir við teirri grundgeving, at tann tíðarbundna leingjanin av ávirkanini ikki var nøktandi, tá tað er ein medisinskur samanhangur millum ávirkanina og skaðan.

Og so skal tað heldur ikki vera møguligt, at avvísa mál um brádligan lyftiskaða við teirri grundgeving, at tað ikki var nøktandi lyftiarbeiði frammanundan, tá tað er ein medisinskur samanhangur millum ávirkanina og skaðan.

Talan er um víðkan av verandi skaðahugtøkum. Tað ber við sær, at tað ikki koma at vera skaðar, sum kunnu góðkennast eftir galdandi reglum, sum ikki kunnu góðkennast eftir tí nýggja vanlukkuhugtakinum.

Hinvegin eru tað ikki allir skaðar, sum skulu góðkennast, tá teir henda undir arbeiði.

Tað skal framvegis vera atvoldarsamband millum eina ávirkan og ein skaða. Ein skaði skal framvegis verða avvístur, um tann ávirkan, sum talan er um, ikki er nýtilig til at volda skaðan, ella ávirkanin ikki skyldast arbeiði ella tey viðurskifti, sum arbeiðið fer fram undir.

Mælt verður til at seta inn eitt nýtt vanlukkuhugtak við orðingini: ”Ein persónskaði, sum stendst av eini hending ella eini ávirkan, sum hendir brádliga ella innan 5 dagar”.

Við hesi orðing verður vanlukkuhugtakið víðkað svarandi til gongdina á tí tryggingarrættarliga økinum.

Víðkanin ber herumframt við sær, at skaðar ikki longur kunnu avvísast, tí teir eru “væntandi” ella “ vanligir” í arbeiði hjá skadda.

Við hesum verður møguleiki skaptur fyri at viðurkenna arbeiðsskaðar, sum higartil eru avvístir eftir tí vanliga vanlukkuhugtakinum.

Víðkanin umfatar skaðiligt árin, sum varir stutt, og brádligar lyftiskaðar.

Mælt verður samstundis til, at galdandi tvey arbeiðsskaðahugtøk, skaðiligt árin, sum varir hægst 5 dagar, og brádligir lyftiskaðar, verða strikað. Nýggja vanlukkuhugtakið ber við sær, at teir skaðar, sum í dag verða góðkendir sum “skaðiligt árin, sum varir stutt, og brádligar lyftiskaðar”, framyvir verða góðkendir sum vanlukkur.

Skaðiligt árin, sum varir stutt vil blíva góðkent sum fylgja av, at tað nýggja vanlukkuhugtakið umfatar árin, sum hendir brádliga ella innan fyri 5 dagar.

Tað ber við sær, at verandi tíðarbundna “hol” millum vanlukkur og skaðiligt árin, sum varir stutt, við tí verður lokað.

Brádligir lyftiskaðar verða umfataðir sum fylgja av, at tað nýggja vanlukkuhugtakið umfatar persónsskaðar, sum standast av eini hending, sum hendir brádliga.

Samanborið við brádligar lyftiskaðar er tað í tí nýggja vanlukkuhugtakinum ikki – eins og verandi – eitt krav, at talan skal hava verið um tungt lyftiarbeiði í heila tikið. Tað er heldur ikki eitt krav, at talan er um ein varugan skaða.

Til hetta kemur, at viðgerðin av málum um brádligar lyftiskaðar verður gjørd einfaldari, við tað, at málini framyvir ikki verða løgd fyri Vinnusjúkunevndina fyri at verða góðkend.

Vanlukkuhugtakið, sum mælt verður til, er ikki heldur, sum teir brádligu lyftiskaðarnir, avmarkað til ávísar skaðar, ella til skaðar, hendir tá lyft verður.

Nýggja vanlukkuhugtakið er fyrisitingarliga einfalt, við tað at tað ikki vil verða tørvur fyri neyvum læknaligum metingum, tá talan er um eina hending, sum eyðsæð kann greina skaðan.

**Til nr. 2-8:** Talan er um avleiðingarbroytingar í sambandi við nr. 1.

**Til nr. 9:** Broytingin samsvarar í høvuðsheitum við § 52, stk. 2 og 3, í ”lov om arbejdsskadesikring” í Danmark.

Er hendur arbeiðsskaði, sum tryggingarskyldugur arbeiðsgevari ella sjálvstøðugt vinnurekandi ikki hevur tryggjað, verða útreiðslurnar til endurgjald, skaðabót v.m. í § 38 og til málsviðgerðina kortini rindaðar av tryggingarfeløgunum. Hetta fylgir av § 21, stk. 1 í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging.

Broytingin i § 21, stk. 2, hevur við sær, at ein tryggingarskyldugur arbeiðsgevari ella sjálvstøðugt vinnurekandi, sum hevur mishildið tryggingarskylduna, kann áleggjast at endurrinda útreiðslurnar hjá tryggingarfeløgunum eftir § 21, stk. 1.

Í núgaldandi arbeiðsskaðatryggingarlóg er ikki heimild til hetta. Einasta avleiðing av mishaldi av tryggingarskylduni er, at ein upphædd svarandi til tryggingargjøldini, ið áttu at verið goldin einum tryggingarfelag, umframt rentu, kann áleggjast arbeiðsgevaranum og tí sjálvstøðugt vinnurekandi eftir § 17. Harumframt kann talan verða um bót sambært § 83.

Tryggingarfeløgini hava gjørt vart við, at tey hava varhugan av, at núgaldandi reglur og vantandi avleiðingar í arbeiðsskaðatryggingarlógini av mishaldi av tryggingarskylduni geva møguleika fyri spekulatión í ikki at tekna tær sambært lógini kravdu tryggingar, og at hetta í royndum verður framt.

Skotið verður upp at seta inn í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging somu heimild, sum er í Danmark, til at áleggja tryggingarskyldugum arbeiðsgevara, sum hevur mishildið tryggingarskylduna, at gjalda útreiðslurnar hjá tryggingarfeløgunum til endurgjald v.m. í sambandi við arbeiðsskaða hjá arbeiðsfólki.

Tryggingarfeløgini hava fyrr skotið upp heilt at avtaka tryggingarskylduna hjá sjálvstøðugt vinnurekandi, men politiskur vilji hevur ikki verið til hetta. Tessvegna verður skotið upp, at ásetingarnar í nýggju stk. 2-4 eisini verða galdandi fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, soleiðis at sjálvstøðugt vinnurekandi, sum verður fyri arbeiðsskaða, men ikki hevur teknað ta, sambært lógini, kravdu trygging, kortini fær veitingar eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini, men eftir umstøðunum kann áleggjast aftaná heilt ella partvíst at endurrinda útreiðslurnar, sum tryggingarfeløgini hava havt í tí sambandi.

**Til nr. 10:** Broytingin samsvarar við § 36 í ”lov om arbejdsskadesikring” í Danmark, sum varð broytt í 2007 við lóg nr. 496 frá 6. juni 2007. Mett verður, at somu atlit, ið lógu aftan fyri lógarbroytingina í Danmark, gera seg galdandi í Føroyum. Viðvíkjandi endamálinum við lógarbroytingini verður tí sum heild tikið støði til viðmerkingarnar í danska lógaruppskotinum (”lovforslag nr. 194 frá 28. marts 2007).

**Galdandi rættur**
Arbeiðsskaðatryggingarlógin hevur ásetingar um fráboðan av arbeiðsskaða, sum áleggur arbeiðsgevarum, somuleiðis læknum og tannlæknum skyldu til at fráboða skaðarnar. Arbeiðsgevarin hevur einsamallur skyldu til at fráboða vanlukkur. Læknarnir og tannlæknarnir hava einans skyldu til at fráboða sjúkur, sum teir í sambandi við teirra arbeiði staðfesta ella halda kann skyldast arbeiðið.

Fráboðar arbeiðsgevarin ella læknin/tannlæknin ikki skaðan, kunnu øll onnur, harundir skaddi sjálvur, fráboða skaðan. Skaddi kann fráboða skaðan í eitt ár.

Er skaðin ikki fráboðaður áðrenn eitt ár, kann sakin einans viðgerast av álvara við atliti til viðurkenning og endurgjald í Arbejdsskadestyrelsen, um vikið verður frá freistini.

So sum verandi siðvenja er, skulu hesar 4 treytir lúkast, um frávik skal kunna gerast frá fráboðanarfreistini:

1. -Tað skal skjalprógvast, at tað hevur verið ein skaði.
2. -Tað skulu vera fylgjur, sum geva rætt til endurgjald.
3. -Skaðin skal vera orsøk til fylgjurnar, sum geva rætt til endurgjald.
4. -Tað skal vera ein “rímilig grundgeving” fyri, at skaðin ikki er fráboðaður rættstundis.

Siðvenjan við atliti til, nær tað er “rímilig grundgeving” er nágreinað av Ankestyrelsen við meginregluligum avgerðum tey seinastu árini. Nágreiningin hevur borið við sær, at talið av málum, sum ikki blivu meginregluviðgjørd, er vaksið. Tá sakin ikki verður meginregluviðgjørd orsakað av, at farið er út um fráboðanarfreistina, ber tað við sær, at skaddi ella tey, ið eftir sita, ikki fáa tað endurgjald v.m., sum tey annars høvdu rætt til.

Eftir ásetingini í donsku lógini § 12, stk. 2 er ein serstøk ætlan fyri atvoldarsambandið millum skaðan og fylgjurnar.

Eftir siðvenju hjá Ankestyrelsen og Arbejdsskadestyrelsen er henda ætlanarregla ikki galdandi í sambandi við undantakið fyri fráboðanarfreistini.

**Metingar og tilráðingar**
Útgangsstøðið fyri metingini hevur verið, at tað kann kennast stoytandi, at skaddi ella tey, ið sita eftir, missa møguleikan fyri endurgjaldi v.m., sum viðkomandi veruliga hava rætt til, tá arbeiðsgevari ella lækni/tannlækni ikki hava yvirhildið teirra skyldu til at fráboða skaðarnar.

Við hesum støði hevur verið mett, hvussu tað verður tryggjað skadda og teimum, sum eftir sita, endurgjald, tá tann, sum skyldu hevur at fráboða, ikki ger tað.

Niðurstøðan er, at reglurnar í lógini um fráboðan av arbeiðsskaðum ikki eiga at broytast. Mett verður, at tað er av týdningi at hildið verður fast við freistina upp á eitt ár fyri fráboðan, við tað, at hetta vil tryggja, at skaðar verða fráboðaðir skjótt eftir, at teir eru hendir. Hetta tryggjar

møguleika fyri einfaldum skjalprógvi av skaðanum og tess avleiðingum í teimum førum, har arbeiðsgevarin ella lækni/tannlækni ikki heldur fráboðanarskylduna.

Mett hevur verið um ymsar møguleikar fyri at broyta reglurnar í lógini um frávik fyri fráboðanarfreistini fyri arbeiðsskaðar.

Hildið verður, at í fyrsta lagi skal galda ein freist fyri at tryggja, at tey skaddu skjótast møguligt fráboða teirra krøv, so viðurskiftini viðvíkjandi sakini eru lættari at skjalprógva, men hinvegin eiga øll tey skaddu í mest møguligan mun hava tað endurgjald eftir arbeiðsskaðalógini, sum tey hava rætt til.

Mælt verður til eina loysn, har tað í lógini verður nágreinað, nær síggjast kann burtur frá eitt ára freistini.

**Innihaldið í lógaruppskotinum**

Vinnumálaráðið heldur, at tað er av týdningi, at tey skaddu og tey sum eftir sita, fáa tað endurgjald v.m. eftir arbeiðsskaðalógini, sum tey hava rætt til.

Fyrisitingin hevur fingið atfinningar av teimum stívu reglunum viðvíkjandi ov seint fráboðaðum arbeiðsskaðum, sum nevnt omanfyri.

Vinnumálaráðið mælir tí til at javna regluna um frávik frá fráboðanarfreistini fyri at tryggja, at tey skaddu og tey, sum eftir sita, verða tryggjað endurgjald v.m. Eftir uppskotinum fara fleiri skadd at fáa endurgjald, uttan mun til, um sakin er fráboðað ov seint.

Uppskotið ber við sær, at víkjast kann frá eitt ára freistini, tá skjalprógvast kann, at:

1. hendur er ein arbeiðsskaði,
2. tað eru fylgjur, sum geva rætt til endurgjald og
3. arbeiðsskaðin er ein sikkur orsøk til fylgjurnar

Verandi treytir um, at tað skulu verða rímiligar orsøkir til, at fráboðanin ikki er gjørd til røttu tíð, fellur burtur í uppskotinum.

Samstundis verður mælt til at samskipa (kodificere) galdandi siðvenju, har “formodningsreglan” í lógini síðan ikki er galdandi, tá mett verður um atvoldarsamanhang millum skaða og fylgjur, tá víkjast skal frá fráboðanarfreistini.

Skjalprógv fyri, at tað er hendur ein skaði í sambandi við arbeiði, er lættast at gera av beint eftir, at skaðin er hendur. Skaddi ella tey, sum eftir sita, eiga tí framhaldandi at tryggja sær, at arbeiðsgevarin/læknin/tannlæknin fráboðar skaðan.

Um so er, at arbeiðsgevarin/læknin/tannlæknin ikki fráboða skaðan, eigur skaddi ella tey, sum eftir sita, sjálv at fráboða skaðan skjótast møguligt.

Tær ásetingarnar, sum mælt er til, taka hædd fyri tí støðu, at skaddi ella tey sum eftir sita, fyrst eftir at fari er yvir um eitt ára freistina verða kunnug um, at tað er eitt krav eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini, sum ikki er fráboðað av arbeiðsgevara ella lækna/tannlækna.

**Til nr. 11:** Broytingin samsvarar við § 32, stk. 2, í ”lov om arbejdsskadesikring” í Danmark.

Broytingin hevur við sær, at arbeiðsgevarin ikki hevur skyldu at fráboða vinnusjúku. Sum oftast verður vinnusjúka fráboðað av tryggjaða ella av læknanum. Arbeiðsgevarin hevur sjáldan neyðuga kunnleikan til heilsuviðurskifti hjá starvsfólkunum og vitan um møgulig sambond millum ávirkan í arbeiðsumhvørvinum og sjúkurnar. Fráboðanarskyldan hjá arbeiðsgevaranum fyri vinnusjúkur er tí langt síðani avtikin í Danmark.

**Til nr. 12:** Broytingin samsvarar við § 44, stk. 7 og 8, í ”lov om arbejdsskadesikring” í Danmark.
Ankestyrelsen í Danmark viðger kærumál frá Vanlukkutryggingarráðnum. Sum er nú, skal Vanlukkutryggingarráðið senda eina kæru víðari til Ankestyrelsen beinleiðis og uttan at taka støðu til kæruna. Ankestyrelsen hevur fyrr latið Vanlukkutryggingarráðið skilja, at heimild ikki er í løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging fyri at gera eina endurmeting, tá ið kært er. Í fleiri førum hevur tað víst seg óhent, at møguleiki ikki er hjá Vanlukkutryggingarráðnum at gera eina endurmeting, grundað á upplýsingarnar í kæruni. Fleiri ferðir hevði tað við endurmeting borið til at sloppið undan eini drúgvari kærumálsviðgerð. Skotið verður tí upp, at ein beinleiðis heimild fyri endurmeting í sambandi við kæru verður sett í lógina.

**Til nr. 13:** Broytingin samsvarar við § 15, stk. 4, í ”lov om arbejdsskadesikring” í Danmark.
Endurgjald av kostnaðinum av at umvæla ella endurnýggja hjálparamboðið er eftir núgaldandi løgtingslóg um arbeiðskaðatrygging treytað av, at hjálparamboðið er vorðið skatt í sambandi við ein persónsskaða ella ein tilburð ella ávirkan, ið kann javnsetast við ein persónsskaða. Sambært § 15, stk. 4, í ”lov om arbejdsskadesikring” er tað ikki ein treyt í Danmark, at talan er um persónsskaða. Hetta hevur havt við sær, at Vanlukkutryggingarráðið hevur noktað at veita endurgjald fyri t.d. brillur í førum, har endurgjald av kostnaðinum av at umvæla ella endurnýggja hjálparamboðið hevði verið veitt í Danmark. Hildið verður, at ongin haldbar og rímilig orsøk er til, at munur skal vera á hesum øki millum Føroyar og Danmark.

**Til § 2:** Ásetir, nær lógin fær gildi, og hvat lógin fevnir um.

Vinnumálaráðið

Johan Dahl

landsstýrismaður

/Bjørgfríð Ludvig